# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



## Minningarorð um Jonhard Egholm



Nøkur orð um mín góða beiggja Jonhard. Hetta er ómetaliga tungt at seta seg at skriva.

Fyri knapt tveimum árum síðan fór eg við familju míni niður til Danmarkar at ferðast. Var illa nokk komin niður, tá eg bleiv uppringd, at tú vart illa sjúkur. Tú hevði í nógv ár havt eina keðiliga sjúku at dragast við, ja, heili 40 ár, og so skuldi tú fáa hesa sjúkuna afturat. Tað var tað allar ringasta, sum kundi henda. Góði Jonhard, eg og mín familja hava so ómetaliga nógv gott at minnast afturá. Tú var altíð so glaður, tá vit komu inn á gólvið hjá tykkum.

Eg havi so nógv gott at minnast til tín, eisini tá vit vóru børn, tá tók tú meg altíð við tær. Eitt nú tá tú fór at fiska ella at seta gørn. Tær dámdi so væl sjólívið, men sjúkan forðaði tær í tí. Tú keypti tær eisini aktiur í Nólsoyar Páll, so tað var eingin ivi, at tað var tann vegin, tú ætlaði at fara.

Tá tú var mitt í tjúgunum fort tú til Danmarkar at fáa tær útbúgving sum pleygari. Arbeiddi eina tíð niðri, til psykiatriska deild læt upp í Havn í 1969. Tá flutti tú heim aftur og var sostatt við til at taka ímóti teimum fyrstu sjúklingunum. Har vart tú til ár 2000, tá sjúkan byrjaði at gera um seg.

Eisini dámdi tær so ómetaliga væl at mála, og málaði tú nógv hús um sumrarnar. Tað gjørdu tú eisini við tykkara hús síðsta summar. Bæði á Hvítanesi og uppi í Børkugøtu. Ja, tað er tungt at síggja stigarnar liggja í túninum og málingablikkini standa órørd.

Góða Jonna, tú verður heldur ikki gloymd. Tú var nógv um Jonhard og passaði hann væl og virðiliga líka til tað síðsta. Tit áttu tvey børn og trý deilig ommu- og abbabørn, sum Jonhard var so ómetaliga glaður fyri. Altíð klárur at koyra tey, um tey skuldu onkustaðni. Hann gleddi seg eisini til at tú, góði Leivur, skuldi konfirmerast í heyst, men tað upplivdi abbin ikki.

Góði Jonhard, tað kundi verið so nógv annað at skriva um, tí sum sagt, minnini eru nógv, men við hesum orðum fari eg at lýsa frið yvir minnið um góða beiggja mín Jonhard.

**Systir tín við familju**
**Esther Jenny**

### 90 ára føðingardagur

Sunnudagin 11. juli verður Jenny Ellingsgaard, Eiði, fødd Rasmussen og ættað av Norðskála 90 ár. Tann, ið hevur hug at heilsa uppá Jenny á føðingardegi hennara, hendan dagin, er hjartaliga vælkomin á Korndalsbýlið á Eiði millum kl 15.00 og 18.00.

### 90 ára føðingardagur

Mánadagin 12. juli verður Símun Pauli Djurhuus, málari, Tórshavn 90 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Símun eru hjartaliga vælkomin á Suðuroyaveg 7, frá kl. 17.00

### 90 ára føðingardagur

Mikudagin 14. juli verður Hans Marius (Lilleven) Johansen, Tvøroyri 90 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Lilleven henda dagin eru hjartaliga vælkomin á Hotel Tvøroyri ímillum kl 11.00 og 15.00.

### 85 ára føðingardagur

Fríggjadagin 9. juli fyllir Karin Johannesen, Tórshavn, 85 ár. Dagurin verður hildin á Ellisheiminum frá kl.16 til 21.

### 80 ára føðingardagur

Mikudagin 7. juli verður Hansina (Goje) Olsen, Syðrugøta 80 ár. Náttverði verður í Streymnesi frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 80 ára føðingardagur

Hósdagin 8. juli verður Jógvan Ingvard Olsen, Toftir, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

### 80 ára føðingardagur

Fríggjadagin 9. juli verður Sanna Johannesen, Skála 80 ár. Vælkomst verður í Meinigheithúsinum á Skála frá kl. 18. fríggjadagin.

### 80 ára føðingardagur

Hin 8. juli fyllir Kanny Sambleben 80 ár. Dagurin verður hildin 10. juli á Hotel Føroyum saman við børnum og næstringum.

# Selma í Focus

Fríggjadagin 9. juli kl. 16 til 18 letur ein framsýning við verkum hjá Selmu Mikladal upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn.

Selma Mikladal er født í 1954 í Klaksvík. Hon er útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur og hevur búð í Keypmannahavn í mong ár. Sína fyrstu málningaframsýning hevði hon í Føroyahúsinum í Keypmannahavn í 2005.

Selma hevur verið nógv í Grønlandi og eisini arbeitt har og upplivað nógv spennandi. Hon hevur altíð fingist við at tekna og at mynda á ymiskan hátt. Hon er altíð á ferð í einum ella øðrum spennandi - sum nú í Galerie Focus, har hon sýnir málningar fram. Myndevnið er ofta tað hon hevur sæð, náttúran, kenslurnar og tað sum stendur eftir, ikki eitt ávíst stað, men samanumtikið tað sansaða, tað upplivaða, tann umgjørda myndin.

Framsýningin verður opin til 22. juli, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.



*Fríggjadagin letur ein framsýning hjá Selmu Mikladal upp í Galerie Focus*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

